## Veksandi hall á handilsjavnanum

Grønlendingar hava stórar trupulleikar við at halda javnvág á handilsjavnanum. Tey seinastu tølini frá hagstovuni í Nuuk vísa, at hallið fyrra hálvár í var var næstan tvær ferðir so stórt sum fyrra hálvár í fjør. Seks teir fyrstu mánaðirnar í fjør var hallið á handilsjavnanum 435 milliónir krónur, men somu mánaðir í ár var tað heilar 833 milliónir krónur, sigur grønlendska kringvarpið. Hagstovan í Nuuk sigur, at tann óhepna gongdin kemst av, at innflutningurin veksur, samstundis sum útflutningurin minkar.



# ...dvíkahjalla

felagnum Siriusi, sum var og nú undir nýggjum hatti framvegis er heildarveitari av pakkitilfari, útgerð og útbúnaði til vinnu og ídnað.

Debes Petersen ásannar, at tað ikki minst er keypið av Siriusi, sum setti ferð á ætlaninar at skipa eina veruliga sølubúð í hølunum á Sandvíkahjalla.

- Við keypinum av Siriusi kunnu vit nú í enn størri mun rópa okkum heildarveitara av reingerðarevnum til fiski-og matvøruídnaðin, stovnar og vanlig húsarhald. Haraftrat eru vit nú eisini veitari av pakkitilfari, pakkiamboðum, maskinum og arbeiðsklæðum til eitt nú vinnu og ídnað, leggur hann aftrat.

Tað var Páll Kjærbo, sum átti fyritøkuna Sirius, og tá Kemilux keypti partapengingin í felagnum, varð fyrrverandi eigarin samstundis settur í starv hjá P/F Kemilux Industri.

### Góður veitari

Debes Petersen sigur, at fyritøkan við nýggju sølubúðini hevur sett sær fyri at økja um tænastuna til verandi og komandi viðskiftafólk.

- Vit vilja verða besti og tryggasti veitarin innan okkara øki við heildarloysnum. Vit hava dygdina á vørunum, bæði innan reingerð, pakkitilfar, arbeiðsklæði og annan útbúnað til vinnu og ídnað.

Stjórin leggur stóran dent á, at uppgávan hjá fyritøkuni er at veita bestu vøruna, ráðgevingina og tænastuna.

Seinnapartin seinasta fríggjadag, sum nýggi handilin læt upp um morgunin, hevði Veitarin – Kemilux Sirius móttøku í sambandi við upplatingina. Viðskiftafólk og fólk annars høvdu høvi at síggja hølir og útboð, og tey høvdu eisini høvi at práta við sølufólk og onnur starvsfólk hjá Kemilux Industri.

Veitarin hevur opið vanligar yrkadagar frá klokkan 8-16. Leygardag er stongt.

*Veitarin, sum hevur eitt stórt vøruútboð, hevur opið vanligar yrkadagar. Leygardag er stongt*






*Kemilux hevur eitt stórt úrval av vaskievnum, bæði til ídnað, stovnar og vanlig húsarhald*

# Kemilux nøktar allan reingerðartørv yvirhøvur

**- Ein av okkara fyrstu vørum, sum stavar heilt aftur til 1968, var rustloysarin til viðlíkahald uttandura. Rustblettir og málaðar flatur kundu viðgerast við hesum evni og síðan spulast við vatni. Úrslitini hava víst seg at vera sera munadygg, og rustloysarin er framvegis ein av best umtóktu vørunum í okkara fjølbroyttu vøruskrá, sigur stjórin á Kemilux, Debes Petersen**

REINGERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Høvuðsendamálið hjá Kemilux Industri er at nøkta allan reingerðartørv – heilt frá grovreingerð á skipsdekki og í maskinrúmum til serliga tørvin innan reingerð, sum matvøruídnaðurin krevur. Privatu húsarhaldini eru eisini partur av málbólkinum hjá fyritøkuni við vørum sum eitt nú grønsápu, uppvaski, glaspussi og toyskoli.

Á Kemilux býta tey virkisøkini upp í tríggjar bólkar 1) Food Industry, sum eru fiskavirki, stórkøkar og annað, 2) Dirty Business, sum er skip, skipasmiðjur, oljuvinna og annað og 3) Soft Business, sum eru húsarhald, stovnar og annað.

Umleið ein triðingur av framleiðsluni hjá Kemilux verður seldur av landinum, og nú fiskivinnan í eitt nú Danmark hevur verið minkandi seinnu árini, fara fleiri og fleiri vørur umborð á farmaskip.

Millum keyparar av vørum hjá Kemilux, eru eitt nú skip hjá stórrreiðarínum, Mærsk.

- Vit hava altíð sýnt sjóvinnuni serligan ans, og í dag kunnu vit staðfesta, at okkara framleiðsla finst umborð á fleiri skipum kring um á heimshøvunum.

Stjórin í Kemilux, Debes Petersen, sigur, at afturmeldingarnar um dygdirnar hjá vaskievnunum, sum fyritøkan framleiðir, sum heild hava verið sera positivar.

### Góð vørumerki

Kemilux Industri kann eisini fegnast um, at oljuvinnan í størri og størri mun vísir vørunum ans og er vorðin ein partur av marknaðinum.

- Ein av okkara fyrstu vørum, sum stavar heilt aftur til 1968, var rustloysarin til viðlíkahald uttandura. Rustblettir og málaðar flatur kundu viðgerast við hesum evni og síðan spulast við vatni. Úrslitini hava víst seg at vera sera munadygg, og er rustloysarin framvegis ein av best umtóktu vørunum í okkara fjølbroyttu vøruskrá, sigur stjórin.

Hann vísir á, at ein onnur vøra, sum Kemilux Industri er kent fyri, er S2-Extra, sum er óføra góð til alt, sum er gravskitið.

- Henda vøra er sera munadygg til vasking umborð á skipum, oljuboripallum og líknandi. S1-Extra kann brúkast til reingerð heilt úr maskinrúmi og upp á brúnna.

Kemilux hevur eisini ment hesa vøru, soleiðis at hon eisini er sera væl egnað til vasking innan matvøruídnaðin.

- Vit hava gjørt eina eins góða sápu, sum livir upp til øll tey strongu krøv, ið eru til reingerð innan hetta øki.

Stjórin, Debes Petersen, vísir á, at úrslitið av hesi menning er S2-Extra, sum er góðkend sápa til allar framleiðslumaskinur, ið nýttar verða í matvøruframleiðslu.

- Vit framleiða eini 10 tons av S1-Extra um vikuna til sølu bæði í Føroyum og uttanlands. Hetta vaskievnið verður eisini nógv nýtt til eitt nú reingerð eftir eldskaðar, har S1-Extra at kalla er einasta vaskievni, ið nyttar nakað, leggur hann aftrat.

### Avfeittari

Tvey onnur kend vørusløg í útboðunum hjá Kemilux eru H79 og H80, sum er ein "grønari" vøruframleiðsla.

- Øll maskinverkstøð avfeitta dagliga maskinlutir fyri olju og viðheftan skitt, og í húsarhaldum er javnan neyðugt at taka burtur eitt nú feitt ella tjøru av klæðum og øðrum.

Debes Petersen vísir á, at H79 avfeittarin hjá Kemilux verður nógv nýttur innan reingerð, tí hann upployisir olju, tjøru, asfalt og feitt.

- H80 er grøna alternativið til vælroynda avfeittaran, H79. Grøna alternativið er ein vatngrundaður avfeittari, sum bæði kann nýtast í ídnaðinum og í vanligum húsarhaldi.

Stjórin sigur, at H80 ikki minst er vælumtóktur til bilvask.

### Grøn vørumerking

- At vøran er merkt við "grønum", merkir, at hon er umhvørvisvinarlig. Grøn vørumerking er tó ikki – sum mong kanska halda – eitt krav frá ávísum myndugleikum ella instansum, men meira at rokna sum partur av marknaðarføring.

Debes Petersen sigur, at vørur, sum Kemilux framleiðir, lúka somu krøv sum vørur við grønum merki.

- Hetta gera tær, hóast tær ikki eru "grøn" merktar, sum hann tekur til.